

# Pinkuhjálmur, læraravegleiðing
# 4.-6. flokkur

## Innihald:

Støði

Førleikamál í 2. undirvísingarparti

Fakta um súkkluhjálm

Uppskot til virksemi

Tak foreldrini við

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK



# Støði

### Pinkuhjálmur í 2. undirvísingarparti (4.-6.flokki)

Royndir uttanlands vísa, at talið á børnum, sum nýta súkkluhjálm, tá tey súkkla, lækkar eftir 3. flokk. Samstundis hækkar talið á súkkluóhappum.

Undirvísingin skal tískil leggja dent á at eggja næmingunum til framhaldandi at spenna súkkluhjálmin á høvdið, tá teir súkkla. Tað skal millum annað gerast við at geva næmingunum eina fatan av, hvørja verju hjálmurin veitir teimum, og hvørjar avleiðingarnar kunnu verða, um høvdið fær ein harðan stoyt.

Pinkuhjálmurin gevur bæði næmingum og foreldrum eina sterka sansaliga uppliving av, hvussu stórur munur er á at raka asfaltið við og uttan súkkluhjálm.

# Førleikamál í 2. undirvísingarparti

### Næmingurin lærir ástøðið:

- at ferðast trygt á súkklu í samspælinum við onnur í ferðsluni við at vera ansin
- at lýsa, hvussu óskynsamur atburður í ferðsluni kann ávirka ferðslutrygdina

# Fakta um súkkluhjálm

Ein súkklari er illa vardur í ferðsluni, og vandin fyri at fáa skaða er stórur samanborið við onnur í ferðsluni. Millum álvarsligastu skaðarnar í súkkluóhappum eru skaðar á høvdið.

Á hvørjum ári fáa nógv fólk læknaviðgerð í sambandi við súkkluóhapp. Talan er í flestu førum um smærri snuddir, men álvarsligastu skaðarnir hava ofta við sær varandi mein í høvd og nakka. Sjálvt lutfalsliga smáir stoytir kunnu hava við sær varandi mein so sum høvuðpínu, ørilsi, ljósviðkvæmi og trupulleikar at hugsavna seg.

Annarhvør súkklari, sum endaði á skaðastovu í Danmark í 2010, hevði heila- ella skallaskaðar. Umleið helvtin av teimum hevði sloppið undan løsti, brúktu tey hjálm.

Kelda: Statens Institut for Folkesundhed/Rådet for Sikker Trafik

Ein súkkluhjálmur kann ikki forða fyri, at eitt óhapp hendir, men hann kann verja høvdið, so skaðin ikki gerst so álvarsligur.

### Soleiðis virkar hjálmurin:

Hjálmurin virkar stoytdoyvandi, so at slagið móti høvdinum ikki verður so hart. Eisini javnar hann stoytin yvir eina størri flatu, so at løsturin ikki bert rakar høvdið í eitt punkt. Brúkar tú hjálm, minkar vandin fyri løsti á høvdið við 60-80 %.

**Brúkar tú hjálm, minkar vandin fyri løsti á høvdið við 60-80%**



## Norðurlendskar kanningar

Donsk kanning frá 2011 vísir, at 87 % av børnunum millum 6 og 9 ár nýta súkkluhjálm, meðan talið lækkar niður í 65 %, tá børnini eru 10-12 ár. Í norskari kanning frá 2013 sæst, at 75 % av børnum undir 12 ár nýta súkkluhjálm, meðan talið lækkar heilt niður í 36% hjá teim 12-17 ára gomlu. Í Føroyum eru eingi samsvarandi hagtøl, men hugsandi er, at myndin er hin sama í Føroyum, og at nýtslan lækkar við aldrinum.

Keldur: www.tryggtrafikk.no og 'Brug af cykelhjelm i bytrafik 2011', Rådet for Sikker Trafik

Føroyar vóru partur av norðurlendskari kanning um ferðslu í 2010. Kanningin vísti, at 64 % av teimum, sum súkkla í Føroyum, ikki nýta hjálm, 21 % nýta hjálm av og á og 15 % nýta altíð hjálm. Fyrivarni verður tikið við úrslitinum, tí 70 % av teimum spurdu súkklaðu ikki, og færri enn 5 % súkklaðu hvønn dag.

Orsøkirnar til, at fólk ikki nýta súkkluhjálm, eru millum annað:

- tey siga seg ongan eiga
- tey súkkla nóg varliga
- tey halda, at tað sær býtt út at súkkla í hjálmi

Kelda: Nordiska trafiksikkerhetsrådet, 2010

# Uppskot til virksemi

## A: Brúkið høvdið

**Lærugrein: Føroyskt, 4.-6. flokkur / Tíð: uml. 20 min. / Tilfar: Pinkuhjálmur, rátt egg, klárur frystiposi, fylgiskjal 1: "Ein skaddur heili"**

1. Les "Vegleiðing til pinkuhjálm" og vís næmingunum, hvussu pinkuhjálmurin virkar. Kunna næmingarnar um, hví tað er skilagott at nýta súkkluhjálm. Tak útgangsstøði í "Fakta um súkkluhjálm" omanfyri.
2. Prenta fylgiskjalið "Ein skaddur heili" út til næmingarnar. Viðgerið innihaldið í skjalinum, sum vísir, hvussu heilin kann verða ávirkaður av einum stoyti í høvdið.

## B: Søgan um Ólav

**Lærugrein: Føroyskt, 4.-6. flokkur / Tíð: uml. 30 min. / Tilfar: Framløga: "Søgan um Ólav".**

Lesið framløguna, "Søgan um Ólav". Teksturin kann antin verða lisin hart fyri næmingunum, meðan farið verður gjøgnum framløguna á samvirknu talvuni, ella næmingarnir lesa tekstin hvør sær.

**Kjakist í flokkinum um:**

- Hvønn týdning hevði tað fyri Ólav, at hann var í súkkluhjálmi?
- Hví er týdningarmeiri at verja høvdið fram um aðrar kropslutir, tá tú súkklar? Tak støði í faktaboksunum í framløguni um Ólav og í fylgiskjalinum "Ein skaddur heili".
- Hví munnu summi velja at súkkla uttan hjálm?

# Pinkuhjálmur, læraravegleiðing
# 4.-6. flokkur



- Ólavur mátti hava hjálp til alt í ein mánað eftir óhappið. Fá næmingarnar at kjakast um, hvønn týdning tað hevði havt á teirra gerandisdag, um tey vóru í somu støðu. Hvørjar høvdu størstu avbjóðingarnar verið? Hvønn týdning hevur heilin fyri okkum?
- Møguliga hevur onkur í flokkinum upplivað ella verið vitni til eitt óhapp á súkklu, ella møguliga kenna tey onkran, sum hevur verið fyri súkkluóhappi. Lat næmingarnar greiða frá egnum upplivingum.

## D: Tín súkkluhjálmur

**Lærugrein: Føroyskt, 4.-6. flokkur / Tíð: 15 min. / Tilfar: Súkkluhjálmarnir hjá børnunum, tín súkkluhjálmur, fylgiskjal 2: "Set hjálmin rætt".**

1. Vís næmingunum, at ein súkkluhjálmur skal sita vatnrættur á høvdinum og verða spentur soleiðis, at hjálmurin situr fastur. Pláss skal vera fyri tveimum fingrum ímillum høkuna og reimina. Prenta fylgiskjal 2 "Set hjálmin rætt" til næmingarnar.
2. Næmingarnir arbeiða saman tveir og tveir og vita, um súkkluhjálmurin situr, sum hann skal. Situr hjálmurin rætt á høvdinum, og er hann spentur nóg væl? Hjálp næmingunum, um teir ivast.



Set hjálmin rætt!

Súkkluhjálmurin skal kennast væl á høvdinum og hava hóskandi støðd. Neyðugt kann vera at royna fleiri ymisk snið, áðrenn tú finnur ein hjálm, sum er hóskandi til tín.

Hjálmurin skal sita at kalla vatnrættur á høvdinum. Umleið tveir cm skulu vera frá eygnabrúnum til kantin á hjálminum framman.

Teir báðir stropparnir báðu megin við skulu savnast í síðuspenninum beint undir oyralippuni og ikki niðri við høkuna.

Hevur hjálmurin fingið ein harðan stoyt, skal hann skiftast út, eisini hóast tú ikki sært, at hann er brotin.

Hjálmurin skal skiftast út, tá hann er ov lítil til at verja høvdið.

Hjálmurin skal bert nýtast, tá tú súkklar. Tað kann vera vandamikið at til dømis klintra í trøum og spælistativum við súkkluhjálmi á høvdinum, tí hann kann gerast fastur.

Stropparnir skulu ikki spennast heilt fastir, men heldur ikki sita leysir. Pláss skal einans vera fyri at fáa tveir fingrar millum stropparnar og høkuna.

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

SIKKER TRAFIK

# Tak foreldrini við

## 1. Kunna foreldrini

Kunna foreldrini um, at flokkurin arbeiðir við súkkluhjálmi og eggja teimum at spyrja børnini, hvat ein pinkuhjálmur er?

Minn foreldrini á, at tey sum fyrimyndir hjá børnunum hava ein týdningarmiklan leiklut í mun til ferðslutrygdina hjá børnunum.

## 2. Pinkuhjálmur á foreldrafundi

Set 10 minuttir av á einum foreldrafundi til at tosa um ferðslutrygd hjá børnunum, har tit millum annað umrøða súkkluhjálm.

Tit kunnu byrja við at lata foreldrini kjakast um teirra ábyrgd í mun til ferðslutrygdina hjá børnunum. Legg upp til kjak um millum annað nýtsluna av súkkluhjálmi:

1. Hvør hevur ábyrgd av, at børnini eru trygg á súkklu?
2. Hvønn týdning hevur atburðurin hjá teim vaksnu fyri børnini?
3. Hvønn politikk hevur skúlin?
4. Hvat kunnu vit foreldur gera?

Greið foreldrunum frá, at tit arbeiða í flokkinum við týdninginum av at nýta súkkluhjálm við at vísa á innihaldið úr faktaboksini omanfyri og við at vísa, hvussu pinkuhjálmurin virkar – um foreldrini ikki hava sæð hetta á foreldrafundi í 1. undirvísingarparti. Tað kann koma óvart á foreldrini at síggja, hvussu væl hjálmurin verjir viðbrekna eggjaskalið, og harvið eisini heilan.

Tit kunnu enda við at hyggja at avstralska filmsbrotinum "Children see. Children do", sum á skemtiligan hátt minnir okkum á, at børn herma eftir tí, tey vaksnu gera.

Tak filmsbrotið niður her: [http://www.youtube.com/watch?v=7d4gmdl3zNQ](http://www.youtube.com/watch?v=7d4gmdl3zNQ)

**Skallin**
**verður ikki tjykkri við aldrinum, so tað er týdningarmikið, at vaksin eisini nýta súkkluhjálm.**